**FAMILJU- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ**

# Starv í Familju - og heilsumálaráðnum

**1 starv sum fulltrúi við tænastu á Starvsfólkadeildini verður við hesum lýst leyst til setan 1. september 2003 ella eftir nærri avtalu**

**Uppgávurnar hjá fulltrúanum verða í høvuðsheitum:**
- Umsita Kommunulæknaøkið, harundir avgreiða setanir o.a.
- Avgreiða lønar- og setanarmál , har aðalráðið er setanarmyndugleiki
- Viðvirka í øðrum arbeiðsuppgávum á deildini, í mun til førleika og royndir

Av tí at talan er um eitt livandi arbeiðspláss har broytingar ofta koma fyri, má tann, sum settur verður, duga at taka ta avbjóðing, at eisini aðrar uppgávur, sum ikki beinleiðis eru starvsfólkauppgávur vera lagdar afturat, somuleiðis sum at bygnaðarbroytingar annars kunnu ávirka starvið.

**Vit kundu hugsa okkum umsøkjarar sum hava:**
- Viðkomandi útbúgving frá hægri læristovni - ella -
- Aðra viðkomandi útbúgving, hollar royndir og áhuga innan arbeiði við starvsfólkaviðurskiftum
- Samstarvshuga
- Hug framhaldandi at menna seg innan starvsfólkaviðurskifti
- Evni at arbeiða sjálvstøðugt
- Kunnleika til arbeiði í eini politiskari fyrisiting
- Góðan málførleika

**Vit bjóða:**
Sjálvstøðugt starv, til tíðir strævið, men eisini áhugavert, við fjølbroyttum uppgávum
Flextíð
Skeið og eftirútbúgvingarmøguleikar

**Løn- og setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.
Setanarøki er alt Familju - og heilsumálaráðið við tilhoyrandi stovnum, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovan. Arbeiðsstað inntil víðari er Starvsfólkadeildin við tilvísing til deildarstjóran.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Mariu á Dul, starvsfólkastjóra, tlf. 30 40 40, ella e-mail mad@hmr.fo, har starvslýsing eisini kann fáast.

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av viðkomandi prógvum og møguligum referensum skal sendast til:
Familju - og heilsumálaráðið
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn
**Umsóknarfreist: 16. juli 2003 kl. 12.00**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Roknskapardeildin

Roknskapardeildin umsitur bókhaldið hjá øllum kommunalum stovnum.

Á deildini starvast 8 fólk

Roknskapardeildin heldur till í nýístandgjørdum hølum á Glade Hjørn

www.torshavn.fo

## Skrivstovufólk til Roknskapardeildina

**Starvið**
Søkt verður eftir avloysara til roknskapardeildina frá 1. sepetmber 2003 til 1. mai 2004.

**Arbeiðið umfatar**
Í høvðusheitum avgreiðsla av innkomnum posti, skráseting og bókingar av rokningum, avstemman av ognarum, umframt annað fyrifallandi skrivstovuarbeiði.

**Vit ynskja**
At tú hevur skrivstovuútbúgving og royndir innan bókhaldsarbeiðið. At tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og viðskiftafólk. Kunnleiki til edv er neyðugur.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett 1. september 2003. Løn sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelaga.

**Meiri fæst at vita**
við at venda sær til Hera Olsen, deildarleiðara, ella Janus Isfeldt, leiðara á starvsfólkadeildini á tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsing um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, postboks 32, 110 Tórshavní hendi seinast 21.juli 2003 . Merk umsóknina "roknskaparfólk".

# Almannastovan

# Stuðulsfólk

Almannastovan søkir við hesum eftir stuðulsfólki.
Sum stuðul fært tú eitt sjálvstøðugt og fjølbroytt starv.

**Arbeiðið fevnir m.a. um:**
Fylgjarauppgávur Stimbran Familjuráðgeving Umlætting

**Størvini eru hesi:**
**í Eysturoy**
1) At stuðla og stimbra einum skúlabarni og familjuni í síni heild.
Tímatalið er 30 tímar um vikuna.
Fólk, ið hava royndir innan hetta øki, hava fyrimun.

**Vikuskiftisfamilja**
2) Søkt verður eftir eini vikuskiftisfamilju til at vera um eina 11 ára gamla gentu triðja hvørt vikuskifti, og annars tá tørvur er á tí.

Størvini skulu setast sum skjótast.

Setanarviðurskiftini eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag í mun til uppgávuna.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Barnaforsorgartoymið á tlf. 353510, gerandisdagar millum klokkan 09.00 og 13.00, tó ikki mikudag.

Umsóknin saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum, skulu vera

**Almannastovuni**
J. Bronckgøta 27
Postboks 3096
110 Tórshavn

í hendi í seinasta lagi 15.07.2003.

Í umsóknini skal vera tilskilað uppgávunummar.

## Asfalteringsarbeiði til privat og vinnuligt

Alt asfalteringsarbeiði, so sum: Vegir, gongubreytir, parkeringsøki, tún og annað verður gjørt.

**Tel 220179 Jóhannus Rasmussen**
**Tel 227910 Heri Jacobsen**

Asfalt Sp/f
H.J. Asfalt

Gerðisvegur 12 • FO-660 Søldarfjørður • Faroe Islands

Sp/f H.J Asfalt • Fo-660 Søldarfjørður

Sosialurin 341800



**Toll- og Skattstova Føroya**

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum.

Uppgávur stovnsins eru m.a. at fyrisita
- skattalógina
- tolllógina
- mvg-lógina
- kolvetnisskattalógina
- avgjaldslógirnar,

eins og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økis-skrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin.

Á Streymoyar Øki, Smyrilsvegi har viðkomandi kemur at starvast, eru 35 starvsfólk.

Lýsingin finst eisini á heimasíðu okkara:
www.tollskatt.fo

E-mail:
Streymoy@tollskatt.fo

# Grannskoðari og málsviðgeri

Á Toll- og Skattstovu Føroya, Streymoyar Øki, eru 2 størv leys at søkja.

**Hesi størv umfata:**
1 fast starv sum grannskoðari til setan 1/9 2003 ella so skjótt sum til ber

1 avloysari sum málsviðgeri frá 1/9 2003 til 15/4 2004

**Høvuðsuppgávur - grannskoðari:**
Grannskoðan av virkisroknskapum við atliti til skatta- og MVG uppgerðir, umframt aðrar avgjaldslógir, sum stovnurin umsitur.

**Førleikakrøv**
Tann, sum settur verður, skal helst hava roknskaparligan førleika, sum t.d. HD, merconom í roknskapi ella grannskoðan, aðra líknandi útbúgving ella royndir í roknskapararbeiði.
Viðkomandi skal vera arbeiðssamur og fyrikomandi, og skal kunna arbeiða sjálvstøðugt.

**Málsviðgeri:**
Viðgerð av MVG-uppgerðum, skrásetingum í vinnuskránni og ymiskt annað fyrifallandi.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar við HH-útbúgving, skrivstovuútbúgving ella royndum innan skrivstovuarbeiði hava fyrimun.
Viðkomandi skal vera arbeiðsamur og fyrikomandi, og skal kunna arbeiða sjálvstøðugt.

**Vit kunnu bjóða**
- spennandi størv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis eisini eru fakliga krevjandi
- klokkuskipan við flextíð
- sjálvstøðug størv í góðum arbeiðsumhvørvi.

**Setanartreytir**
Løn- og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Núverandi setanarøkið er Streymoyar Øki, men fevnir annars um Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí, og tann/tey, ið sett verða, skulu kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

Viðkomandi, ið settur verður, skal vera fúsur at luttaka í teimum útbúgvingarmøguleikum, sum Toll- og Skattstovan bjóðar bæði á stovninum og uttan fyri stovnin eitt nú á handilsskúla v.m. og taka lut í teimum skeiðum, sum stovnurin fyriskipar.

Nærri frágreiðingar um størvini fáast við at venda sær til Hallbjørg Hansen, deildarleiðara, ella Eyðfinn Hansen, økisstjóra, tlf. 310260.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum, viðmælum og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera Toll- og Skattstovu Føroya, Streymoyar Øki, í hendi í seinasta lagi: **15. august 2003**

**Toll- og Skattstova Føroya**
Streymoyar øki
Postsmoga 3139
FO-110 Tórshavn

www.sosialurin.fo

# Føroya Handilsskúli søkir eftir stjóra

Eitt sera fjølbroytt og spennandi starv sum stjóri á Føroya Handilsskúla er leyst at søkja. Stjórin skal virka fyri at røkka hugsjónum skúlans um Føroya Handilsskúla sum merkantilan vitanardepil og harumframt standa á odda fyri øllum undirvísingarvirksemi, ið fer fram á skúlanum. Starvið verður sett 1. september ella skjótast til ber eftir tað.

**Nakrar av høvuðsuppgávum stjórans eru:**
- At hava námsfrøðiligu leiðsluna á skúlanum
- At hava fíggjarligu og umsitingarligu leiðsluna
- At hava dagligu leiðsluna á deildini í Tórshavn
- At menna virksemið við at fremja menningarætlan skúlans, her í millum útboðið av ymsum útbúgvingum og at fremja møguligar bygnaðarbroytingar
- At samstarva við aðrar miðnámsskúlar til tess at finna felags loysnir sum heild, eitt nú í sambandi við komandi skúladepil við Marknagil
- At umboða skúlan úteftir
- At tryggja javnan fíggjarligan vøkstur

**Førleikakrøv:**
**Vit vænta okkum m.a. at umsøkjararnir hava:**
- Útbúgving á kandidatstigi ella javnbjóðis útbúgving
- Leiðsluroyndir frá tí almenna og/ella privata arbeiðsmarknaðinum
- Góð leiðslu- og samstarvsevni, umframt mennandi leiðslustíl
- Førleika at menna samstarvið við myndugleikar, vinnulívið og aðrar áhugabólkar
- Vilja og evnir at royna nýggjar leiðir
- Førleika at orða seg væl á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli

Fyrimunur er, um umsøkjararin hevur hóskandi undirvísingarroyndir.

**Dentur verður harumframt lagdur á, at viðkomandi:**
- Dugir væl at samskifta og at nýta KT
- Dugir væl at samskipa og raðfesta arbeiðsuppgávur
- Dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- Hevur virðing fyri og dugir at fáast við fólk

**Setanarviðurskifti:**
Starvið verður lønt ájavnt 35. lønarflokki eftir sáttmálanum hjá HL við eini árligari viðbót, umframt eftirløn. Stjórin hevur undirvísingarskyldu, ið Mentamálaráðið ásetur nærri um. Hon er í løtuni 7 lønartímar um vikuna. Um tann, ið settur verður, ikki hevur námsfrøðiliga útbúgving frammanundan, skal hon verða lokin eftir tveimum árum. Tað er landsstýrismaðurin í undirvísingar- og mentamálum, sum setir starvið eftir tilmæli frá stýri skúlans.

**Umsókn:**
Umsókn við CV og avriti av próvskjølum skal stílast til Mentamálaráðið og sendast Føroya Handilsskúla, Marknagilsvegur 77, postsmoga 177, 110 Tórshavn, t-postur: hsh@hsh.fo, so hon er skúlanum í hendi í seinasta lagi 14. juli 2003. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til stjóran á Føroya Handilsskúla Ragnar Magnussen tlf. 317177 / 217177, ella stýrisformannin, Ólav Gregersen, tlf. 223978. Allir fyrispurningar um starvið vera í trúnaði.

Sansir 355 355

**FØROYA HANDILSSKÚLI**

Føroya Handilsskúla · Marknagilsvegur 77 · Postsmoga 177 · 110 Tórshavn · T-postur: hsh@hsh.fo · www.fh.fo

Føroya Handilsskúli er ein stovnur í støðugari menning. Skúlin er sjálvsognarstovnur, ið er skipaður í tríggjar høvuðsdeildir, sum eru deildin í Tórshavn og á Kambsdali, sum fyrst og fremst hava miðnámsútbúgvingarnar, FHS og HH, og Menningardeildin, sum rekur menningarvirksemi, t.d. samstarv við fróðskaparsetur uttanlands. Skúlin hevur eisini deildir í Klaksvík, Vágum og Suðuroy. Á Føroya Handilsskúla ganga umleið 200 næmingar á Hægri Handilsskúla (HH) og 200 á Fyrisiting, Handli og Skrivstovu (FHS). Í Havn starvast um 35 og á Kambsdali 20 lærarar. Samanlagt starvast um 80 fólk á skúlanum. Umframt HH og FHS skipar Føroya Handilsskúli fyri kvøldskúla og framhaldsútbúgvingum, so sum teldustøðingaútbúgving, Master of Management, HD, datanom og merkonom. Føroya Handilsskúli og Tekniski skúli í Tórshavn samstarva um Skeiðsdepilin.

Sosialurin
Sosialurin